## DAGSINS MEINING

# Skynsemi og taktikkur ráddu

Skynsemi og taktikkur hevur óivað rátt, tá Tjóðveldisflokkurin avgjørdi, hvør skuldi taka við sum landsstýrismaður eftir Torbjørn Jacobsen. Óli Holm er drivin organisatiónsmaður, dugur av somu orsøk helst at leggja væl til rættis, og hevur í fleiri ár verið formaður í aðalstjórn floksins.

Hann er ikki so víðgongdur sum undangongumaðurin, hvørki í orði ella hugsjónarliga, og tað er óivað ein fyrimunur, nú eitt lítið ár er eftir av valskeiðnum. Ein annar fyrimunur er óivað, at báðir veingirnir í flokkinum – nýskipanarparturin hjá Høgna Hoydal og teir gomlu við Finnboga Ísaksyni og Signari á Brúnni – kunnu góðtaka vágbingin.

Fyri sunnanmenn og vágbingar er tað óivað eisini ein fyrimunur at fáa ein mann afturat at umboða tann partin av Føroya landi, sum ikki er so mansterkur í sjálvstýrisfylkingini. Tað skerst ikki burtur, at tað hevur gingið rættiliga nógv upp og niður hjá Tjóðveldisflokkinum í Suðuroy. Tað fer kanska at skapa eina javnvág í flokkinum, nú flokkurin skal hava ein mann afturat at umboða flokkin í sunnara parti í oynni, sum enn ikki er komin úr kreppuni, og sum heldur ikki fekk nakað burtur úr oljuvinnuni í fyrstu atløgu.

Hóast hvassa tungan óivað gjørdi av við Torbjørn Jacobsen, so var trupulleikin fólkaskúlin. Eftir at Vestmanna skúli hevði gjørt vart við seg – ella provokera – so vísir tað seg, at flest allir skúlar hava somu trupulleikar: ov fáar tímar við atliti til nýggju fólkaskúlalógina.

Óli Holm er skúlamaður, hevur verið varaskúlstjóri í 28 ár, og kennir tí trupulleikarnar til fulnar. Men spurningurin er, um hann fær nakað av peningi úr kassanum hjá Karsteni Hansen at leska tann afturúrsiglda fólkaskúlan við, og á tann hátt eisini taka nakað av tí ónøgda broddinum millum skúlafólk, eisini tjóðveldisfólk.

Vónandi fer nýggi landsstýrismaðurin at skora upp undir tann mentanarliga partin, sum hevur verið fyri framstigum seinastu árini við m.a. mentunnargrunninum og granskingarætlanini, samstundis sum hann fer at lata lóg og landaskil valda, tá tað snýr seg um største fornminni okkara, Múrin í Kirkjubø, og aftur letur myndugleikan og stovnin á hesum øki málið upp í hendi.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fólkafundur og rockkonsert á Stóru Dímun

**Tjóðveldisflokkurin**
*Tíðindaskriv*

Sunnudagin tann 17. juni 2001, verður skipað fyri einum tiltaki, ið ongantíð hevur sæð sín líka í Føroyum. Á tjóðardegi íslendinga verður innrás gjørd á Stóru Dímun, har 200 frælslyntir føroyingar fara at halda fólkafund og lurta eftir livandi tónleiki. Nógv hevur seinastu árini verið tosað um útjaðaran og hvussu hann skal mennast. Men tey eru neyvan mong, ið hava vitjað fjarðasta útjaðara í Føroyum, hóast fólk flest, manga ferðina hava silgt framvið Stóru Dímun. Nú er kjansurin har, fyri at fáa eitt einanstandandi náttúru- og mentunnarligt upplivilsi.

Stigtakari og fyriskipari av tiltakinum er Tjóðveldisflokkurin. Orsøkin til at vit skipa fyri einum slíkum tiltaki er, at føroyingar tíverri gera alt ov lítið við at njóta tey upplivilsi ið okkara egna náttúra bjóðar okkum. Tí ongantíð áður hava so nógv fólk savnast á Stóru Dímun, og hetta verður neyvan endurtikið. Tiltakið skal eisini sýna, at ein Tjóðveldisflokkurin hevur nógv annað at bjóða, enn tann vanliga gerandisliga politikkin ið fer fram á løgtingi og í landsstýri.

Á fólkafundinum vera hesir røðarar:

Óla Jákup úr Dímun; bóndi, Stóra Dímun.

Høgni Hoydal; landsstýrismaður og formaður Tjóðveldisfloksins.

Tórbjørn Jacobsen; fráfarandi landsstýrismaður í mentanmálum.

Tónleikin undir fólkafundinum stendur okkara kendi troubadurur Sámal Ravnsfjall fyri. Kanska fer fyrrverandi mentanmálaráðharrin eisini at hjálpa honum við onkrum sangi.

Aftaná fólkafundin fara Prix Føroyar vinnararnir Clickhaze við Eivør Pállsdóttir á odda at spæla rocktónleik.

Fundarfólkið verður flutt út í oynna av seglskipunum Jóhannu og Norðlýsinum. Jóhanna siglir av Vági kl. 6.00 við fundarluttakarunum úr Suðuroynni og kl. 6.30 siglir Norðlýsið heiman av Sandi, við fundarluttakarunum úr Sandoynni. Luttakararnar norðanfjørs, fara av Gomlurætt kl. 9.00 og umleið kl 10.00 verður aftur silgt heiman av Sandi. Tá øll fólkini eru komin upp á oynna, umleið kl 12.30, byrjar fólkafundurin.

Aftaná fólkafundin byrjar rockkonsertin. Tá hon er liðug (uml. kl 16.30), fer fyrra liðið av luttakarum av oynni aftur. Norðlýsið siglir inn á Sand og Jóhanna siglir inn á Hvalba. Tá skipini eru aftir (uml. kl. 19.30) fer seinna ferðaliðið av oynni. Tey vera flutt beinleiðis til Havnar, har vit vænta at vera um midnáttarleitið.

Kostnaðurin fyri útferðina er kr. 400,-. Í prísin er íroknað flutningur: Vágur-St.Dímun-Hvalba, Sandur-St.Dímun-Sandur ella Sandur-St.Dímun-Tórshavn. Eisini er trygging ímóti vanlukkutilburðum, íroknað luttøkugjaldið. Harumframt er kaffi og køkur á St. Dímun íroknað.

Tey ið eru áhugað at luttaka á útferðini, kunnu boða frá á Floksskrivstovuni hjá Tjóðveldisflokkinum, tlf. 31 22 00 ella 32 20 50, teldupostur: loysing@post.olivant.fo. Neyðugt er at upplýsa um navn og føðingardag og tlf.nr. hjá øllum luttakarum. Pláss er fyri 50 luttakarum úr Suðuroynni, 50 av Sandoynni og 100 luttakarum norðanfjørðs. Boðað skal vera frá luttøku í seinasta lagi mikudagin tann 13. juni 2001, kl 13. Luttøkugjaldið skal rindast frammundan á konto.nr. 438.049.7 í Føroya Banka, og kvittan fyri inngjaldið havast við tá farið verður avstað.

Ongin ivi er um, at veðurlíkindini eru avgerandi fyri, um tiltakið kann fremjast, ella ikki. Besti streymur er, men farið verður ikki avstað, um tað er vátveður. Um tað er eitt ivamál um ráðiligt er at fara avstað ella ikki, verður endaliga avgerðin tikin av dímunarbóndanum, tíðliga um morgunin tann 17. juni.

# Sangskúlin fullmannaður til verka til heystar

Sum tað áður hevur verið frammi í bløðunum her, hevur Sangskúlin í Reykjavík, sum er eitt eindømi í norðurlendskari tónleikafrálæru, havt ómetaliga stóran týdning fyri sanglívið í Íslandi. Hann er grundarstøði undir Íslendsku Operuni, meira enn nakað hevur hann elvt til, at sangliga medvitið og støði bæði innan tað klassiska og tað "rytmiska" tónleikalívið nú er á so høgum stigi í Íslandi, og tað er honum fyri at takka, at íslendskir sangarar í dag teljast millum teir frægu á tónleikapallum víða um heimin.

Høvuðsfólkini aftan fyri hetta týdningarmikla sangskúlatiltak í Íslandi eru operusangararnir Ólöf Kolbrún Harðardóttir og Garðar Cortes. Í samvinnu við hesi bæði hugsjónarligu tónlistafólk hevur tann ætlan tikið seg upp at fáa í lag skipaða sangundirvísing í Føroyum, í fyrsta lagi sum deild av íslendska sangskúlanum, men miðandi ímóti at seta á stovn ein fulltíðar Sangskúla Føroya um eini 2-3 ár. Sum fyrireiking til slíka skipan her, hava Ólöf og Garðar havt nøkur vikuskeið í Havn, sum greitt hava víst bæði áhuga og raddarjørðildi fyri slíkari framkomnari sangundirvísing í Føroyum.

Men sangskúli er meira enn tað bert at læra at syngja. Næmingarnir skulu eisini læra um nótar og rytmur og sostatt gerast førir fyri sjálvir at kunna seta seg inn í tann tónleik, sum syngjast skal. Sangskúlin býður tí nú sanghugaðum ungfólki til fýra vikuskeið í komandi skúlaári, eitt í heyst og trý í várhálvuni 2002, har tað við fýra lærarum frá Sangskúlanum í Reykjavík verður undirvíst í sangi, nótalæru og nótalestri, og har samsangur eisini er við í tímaætlanini.

Men fyri at kunna seta hesa ætlan í verk er neyðugt at tryggja sær næmingar frammanundan. Tí koma tey bæði Ólöf og Garðar higar í vikuskiftinum 29. juni-2. juli at hitta áhugaðar næmingar og at flokka teir eftir førleika. Næmingarnir skulu tá syngja ein av fýra kendum sangum sum t.d. Tíðin rennur, Eg smáttu veit á grønu ong, tjóðsangin, Um eg kundi kvøðið, ella hvat tey nú hava hug at syngja.

Á heimasíða sangskúlans, www.skulin.fo/fss, sum er í gerð, fæst nærri at vita um ætlaðu skipanina, og haðan fáast umsóknarbløð, ið verða at senda inn í seinasta lagi mikudagin 19. juni. Eisini ber til at melda seg beinleiðis hjá Petru Iversen, tlf. 42 14 02, teldupostur: ffs@skulin.fo

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



## VIÐMERKINGAR

# Verkfallið hjá FA og HAK

**Mikkjal Dánjalsson**

**Sannleikans tími.**
Verkfallið seinastu vikurnar varð ein sigur fyri Føroya Arbeiðarafelag, við stjórn og Ingeborg Vinther á odda, og Havnar Arbeiðskvinnufelag, við stjórn og Vígdis Johannesen á odda, sum man svíða illa á rætta stað - ongin ivi um tað.

Ymiskt grums kom fram hesar vikurnar, sum skal hava hesar viðmerkingar:

**Kappingarføri Føroya.**
Ein kanning var framløgd í 1997, sum ósvitaliga greitt prógvaði, at lønarkappingarføri í Føroyum batnaði sera nógv gjøgnum øll 90-árini. Í absoluttum tølum lá føroyska arbeiðara- tímalønin í 1997 millum botnlønirnar í øllum teimum londum, sum nakað skil er í at samanbera okkum við. Samráðingarnar í 1999 góvu ein varnan reallønarvøkstur; men Starvsmannafelagið liggur inni við dagførdum framrokningum av 1997-kanningini, sum greitt prógva, at gongdin frá 1997 til í ár ikki hevur broytt hetta: Kappingarføri Føroya er sterkt og spilllivandi.

So tað er eftirynskjandi, at ongin búskaparfrøðingur heldur á at júka, at "arbeiðaratímalønin má ikki vaksa, tí so missa vit kappingarføri". Tí júka teir tað enn, so prógvar tað, at teir ikki ynskja føroysku arbeiðaratímalønina ájavnt við Ísland, Bretland og Portugal. Men India ella Hong Kong!

Tvørturímóti krevur kappingarføri lønarvøkstur!

Um onkur búskaparfrøðingur hjá arbeiðsgevaranum ikki hevur fingið tað við í tímanum, so skal hann her fáa tað inn: Kappingarføri kann viðhvørt verða argument fyri reallønarfallið (um málið er vøkstur í tjóðarinntøkuni). Men kappingarføri er líka væl viðhvørt eitt argument fyri lønarvøkstri!

Tað hongur soleiðis saman:

Tak sum dømi tær útreiðslurnar, sum eitt flakavirki hevur av sínum bankalánum: Um bankastjórin nippar dúgliga og títt í rentuútreiðslurnar hjá flakavirkinum, og roynur at toga sum mest inn til bankan, so verður flaka-virkisstjórni klárvakin yvirfyri sínum láni- og kredittútreiðslum,.og roynur at spara hvar hann kann. Men um bankastjórin er eitt LauritsensOysl, sum ikki trýstur flakavirkisstjóran; so verður flakavirkisstjórin dólskur á tí økinum.

Júst uppá sama máta er við lønarútreiðslunum hjá hesum sama flakavirki: Um fakfelagsstjórnin togar og trýstir lønina tað hon er ment; full í dirvi og bragdarhugi: So verður flakavirkisstjórin klárvakin yvirfyri sínum lønarútreiðslum: rasjonaliserar og lønur arbeiðsfólkinum væl, fyri hvørja bøting av arbeiðsgongdini, sum tey finna uppá.

Men lat okkum fantaserað okkum til, at ein fakfelagsstjórn, í einum króki av landinum, so at siga øll er samansett av einum minniluta av "yvirarbeiðsmonnum", sum fáa 25% meira í løn enn meirilutin í felagnum, og sum afturfyri hvína sum bardir hundar, hvørjaferð arbeiðsgevararnir harka; og sum býta og klóra, um meirilutin av "undirarbeiðsmonnum" í hesum hugsaða fakfelag royna at vinna meiriluta í síni egnu fakfelagsstjórn: So má væntast, at virkisstjórarnir í hesum króki av landinum verða dólskir yvirfyri lønarútreiðslunum. Á slíkum virkjum koma fáar effektiviseringar og ongar uppfinningar.

Fría kapping hava dagsins búskaparfrøðingar sum eitt gandaorð, og tað er ein vissur sannleiki í, at hon er framleiðslufremjandi. Men tað er líka væl galdandi fyri fría kapping á arbeiðsmarknaðinum, sum á kapitalmarknaðinum og vørumarknaðinum.

**Gerðarrættardómurin úr USA.**
Til at sanna hetta, sum omanfyri er skrivað, skal nevnast:

Í USA verður rættuliga vanliga brúkt, tá fakfeløg og arbeiðsgevarar togast um løn, at partarnir semjast um at leggja ósemjuna fyri ein gerðarrætt. Báðir partar leggja sínar prógførslur fram fyri ein gerðarrættardómara, og hesin ásetur síðan lønina í einum úrskurði, sum síðan er bindandi fyri báðar partar.

Í einari kanning av nógvum slíkum amerikanskum gerðarrættardómum verður ávíst, at har hava fakfeløg brúkt sum próvgrund fyri at hæðka lønina, at ein ov lág løn gjørdi arbeiðsgevarar- nar dólskar yvirfyri lønarútreiðslunum, og at lønin tí mátti hæðka; fyri at fáa effektiviseringar og rasjonaliseringar. Hendan próggrund hevur verið góðtikin av gerðarrættardómara, og staðfest í úrskurði um, at lønin skuldi hæðka.

Gerðarrættardómarar eru sum allir dómarar fakmenn, tá tað kemur til at eftirkanna próggrundir, so hetta má roknast sum eitt avgeravitni.

Annað dømi:
Timburprísurin í Føroyum.
Eitt annað dømi um sama fyribrygdi, á einum øðrum øki:

Vit hava longi vitað, hvussu raketthøgur timburprísurin er í Føroyum, og beint nú fekk eg at vita, hvussu ótrúliga fleirfalt nógv lægri timburprísurin er í Canada. Og sjálvandi: um húsasmiðja- meistararnir og snikkarameistararnir hava nóg nógvar ríkar kundar, sum keypa teirra timburvørur fyri tann prís teir leggja á. so kann ikki annað væntast, enn at teir halda fram at brúka norska og svenska furu: kanska eitt tað dýrasta timbur í heiminum!

Eg veit ikki hví tað ikki ber til at flyta timbur heimaftur við bingjuskipum sum føra okkara fiskavørur vestur um hav. Men um tað er ov langt til Canada, so er styttri til Ruslands.

Men hevur snikkarameistarin nóg nógvar og nóg dólskar kundar (við tambaðum ístri av donskum korrupsjónsblokki), so kann bara væntast at hann dólskast sjálvur; og fer at hugsa mest um, hvussu hann kanska kann klára at lumpa handverkararnar til ein 4 ára sáttmála einaferð aftrat - við fyrst at tukta Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Ein føroyskur pylsumakari hevði langt síðan havt klára at roknað út, at hann sparur ikki nógv við at keypa bíligar, rakføddar grísar. Klára arbeiðsgevarnir ikki at roknað tilsvarandi roknistykkir, so man tað verða í fínasta lagi, at verkfallsvaktirnir hjá FA og HAK buka tað inn í knokkin á teimum, við teirra tyngstu sleivum.

**Íslendska tímalønin.**
Tað er sera møðsamt at hoyra tann eina mannin júka upp í saman, at "íslendska tímalønin er helvtina av tí føroysku". Hann veit betur. Leggið hann heldur á annan bógv, um "eitt álit má byggjast upp millum partarnar á arbeiðsmarknaðinum".

Tí: í fyrsta lagið er hetta at taka munnin dýrandi fullan, sjálvt um vit bara samanbera tey beru bléktaðu tølini fyri føroysku og tað vekslaðu íslendsku tímalønina. Longu her líkjast orðini keðiliga nógv einum ósannindum.

Men haraftrat: Í øðrum lagi má minnast til tann stóra mun millum føroysku og íslendsku skatta- skipanina: Ein íslendingur kann forvinna tað sum svarar til umleið 6000 føroyskar krónir um mánaðan, áðrenn hann er skyldugur at gjalda landinum eina einastu krónu í inntøkuskatt. (Her verður tó ein partur drigin innaftur, við tað at avgjøld til landskassan eisini eru skipaði ørvísi í Íslandi enn í Føroyum).

Í triðja lagi má minnast til, at ofta er stórur munur á tí virði, sum eitt gjaldoyra hevur innanlands: tá tú fert í ein handil at keypa vøru. Og tí virði, sum sama sjaldoyra hevur uttanlands: tá tú fert í ein banka, at veksla til útlendskt gjaldoyra. Eitt sterkt gjaldoyra, sum til dømis dollarin, hevur hægri virði uttanlands enn innanlands; Einaferð, tá dollarin kundi vekslast til umleið 7 danskar krónir, fekk eg at vita frá einum føroyingi, sum hevði búð eitt ár í USA, at tá tú innanlands í USA fór í ein handil at keypa vøru, hevði ein dollari á leið somu keypiorku sum 3 føroyskar krónir. So meðan uttanlandsvirði á dollaranum tá var 7 føroyskar krónir, var innanlandsvirði umleið 3 krónir. Øvugt við veikari gjaldoyrum: tey hava lægri uttanlandsvirði enn innanlandsvirði.

So hvussu nógv er nú eftir, av sannleiksvirði í júkanini um at "íslendska tímalønin er helvtina av teirri føroysku"? Millum nakað og onki!

Hava roknikalarnir hjá arbeiðsgevarunum nakað at framføra ímóti 1997-kanningini (og hennara dagføring), leggi teir so nøkur haldgóð tøl á borðið. Og gevist teir við at grumsa við hálvum sannleikum og hálvum lygnum.

Hava roknikalarnir hjá arbeiðsgevaranum hug til eitt talv á hesum borðinum, komi so teir. Teir skulu fáa seg fullmettar í aftursvari - tá løtan er til tað.

# Olaf Breiðaskarð, Martin Jacobsen og Kristjan Hansen úr Fuglafirði til minnis

**Trý mannafør hava lagt til og eru farin undir svørð.**

Bønir teirra livandi
seta seg í hamrar og skørð
og grønkandi bø.
Orð og ljóð
av deyðum monnum
fer í døkka grøv
og signa veri teirra deyðsferð
um andans sortnandi fjørð
til ævigar búðir um Heygar
til síðsta beðið
á hesi jørð.

Fýra fjalir
er tað híð,
sum tú vart lagdur í,
men tann dagur sum var,
tann styrki teg bar
um báru og fjørð
og Gjógvaratún,
er hond úr erva,
sum fløvan gav
til hold
á hesi fold;
men, sum nú -
sami Harri í varðveistlu
varandi ljósið ber
í skínandi skrúð
í síni ævigu búð
til tríggjar menn,
sum fóru í senn.

**Frits**

# Lions høvuðsstuðul hjá Túsundárahaldinum

**Túsundárahaldið**
Tíðindaskriv

Í fjør hátíðarhildu vit, at tað vóru umleið 1000 ár síðan, at norski kongurin sendi Sigmund Brestirsson til Føroyar at kristna føroyingar. Túsundárahaldið hevur í hesum sambandi skipað fyri umleið tríhundrað størri og smærri tiltøkum kring landið. Øll minnast vit, tá ið drotningin og hennara fylgi vitjaðu saman við norðurlendsku bispuppunum.

Longu tá ið fyrireikingin byrjaði varð gjørt av, at tá ið túsundárahaldið var liðugt, so skuldi onkrir varðar standa eftir til minnis um hátíðarhaldið.

Higartil hevur túsundárahaldið givið út eina lestrabók og eina nótaútgávu við tónleikinum, sum Bjarni Restorff gjørdi til drotningavitjanina.

Framsýningin hjá J. P. Gregoriussen ferðast í løtuni kring norðurlond, og skulu í ár vera 12 framsýningar í Danmark.

Nevndin arbeiðir í løtuni saman við Hans Paula Olsen, listamanni, við at gera tríggjar bronsustandmyndir. Hetta er eitt tema yvir Sigmund Brestirsson

Uppskotið bygggir á, at vit seta upp tríggjar standmyndir. Tann fyrsta skal standa í Skúgvi, hon ímyndar Sigmund sum ein smádrong, ið spælir sær við skip. Næsta standmyndin er ætlað at standa í Havn. Hon ímyndar Sigmund, sum nú er komin úr Noregi við kristindóminum. Hann stendur við opnum ørmum og ímyndar samstundis ein kross.

Triðja standmyndin er høvdið á Sigmundi, sum liggur á einum steini, og er um søgnina í Sandvík, har Torgrímur Illi gjørdi av við Sigmund, aftan á at hann hevði svomið úr Skúvoy.

Lions hevur frá fyrstu tíð, tá ið fyrireikingin til túsundárhaldið byrjaði, staðið aftanfyri sum fíggjarlig trygd.

Á samkomu í Klaksvík í seinasu viku handaði Lions økisformaðurin, Høgni Mikkelsen, formanninum fyri túsundárahaldinum, Poul Jákup Thomsen, ein kekk uppá 100.000 krónur. Hetta var stuðul frá teim fimm Lions klubbunum,